

www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 06 - 2012

# Nærkast boring í Føroyum í hvørjum

Hóast flest øll royna at sláa kalt vatn í blóðið og hava bæði bein á jørðini, nú enn ein boring fer fram á landgrunninum, so skerst ikki burtur, at stórur spenningur er um brunnin, sum Statoil fer at bora í komandi viku. Nógvar fyrireikingar eru í sambandi við hesa ta mest kostnaðarmiklu verkætlan í Føroya søgu, sum er mett at kosta eina milliard krónur. Kinverski boripallurin Cosl Pioneer er ávegis til Føroya í skrivandi løtu. Hann verður eftir øllum at døma á borileiðini leygardagin. Tað verður so fyrsta royndin hjá hesum boripallinum og harvið eisini kinesiska felagnum at arbeiða á djúpum vatni uttan at brúka akkerð. Cosl Pioneer pallurin er útgjørdur við DP útgerð, sum merkir, at hann skal kunna liggja á sama stað í fleiri mánaðir og brúka serstaka hátøkni fyri at halda seg á staðnum. Á útgerðarstøðini í Runavík eru tey klár til at fara undir hesa áttandu boringina á landgrunninum. Hetta er ein uppgáva tey eru von við, men munurin hesaferð er tann, at ongantíð áður hava oljufeløg sett so stór krøv til eina boriverkætlan sum hesa. Tað fer at taka upp til 4-5 mánaðir at bora Brugdan 2 brunnin og verður hann bæði tann djúpasti og dýrasti brunnurin á føroyska landgrunninum. Hósdagin kom fyrsta stóra frálandaskipið, sum hevur tilknýti til boringina á landgrunninum á Runavík við útgerð til boripallin. Tað er Voldstad Princess. Sí myndir.